# Læraravegleiðing: 2.4.1 Handfaring av brúktum tilfari

## Tema

- Endurnýtt tilfar
- Handfaring av tilfari í royndum
- Arbeiðsumhvørvi

## Mælt tíðarskeið

30 min.

## Viður

Undirvísingartilfar til skeið um endurnýtsluviður í bygging

## Innleiðsla

Í hesi uppgávu fær lærlingurin innlit í, hvussu tilfar kann viðgerast og fyrireikast til nýtslu í nýggjum "nútímans" konstruktiónum. Hvat er umráðandi at hava í huga, og hvør persónlig verndarútgerð skal nýtast.

Uppgávan byggir á, at vit arbeiða við reint træ uttan kemikalir og vandamikil evni. Viður, sum er viðgjørt við kemikalium ella yvirflatuviðgjørdur við máling, sum inniheldur vandamikil evni, skal umhvørvisliga kannast og takast burtur úr einum bygningi, áðrenn tilfarið verður endurnýtt.

Í uppgávuni eru fleiri spurningar, sum lærlingurin skal kjakast um í bólki.

## Fyrireiking

Lærarin eigur at hava lisið tilfarið ígjøgnum, áðrenn tað verður lagt fram fyri lærlinginum.

## Læringamál

- Lærlingurin kann fyrireika viði til innlegging í nýggjar konstruktiónir (F2).
- Lærlingurin kann lýsa, hvussu trætilfar kann fyrireikast til innlegging í nýggjar konstruktiónir (V2).
- Lærlingurin kann grundleggjandi meta um, ein partur av "endurnýtt træ" er hóskandi til innlegging í eina serstaka konstruktión (H2).
- Lærlingurin kann kenna aftur serstøk evnis tilfar og meta um, hvar tað kemur frá (H2).

## Innihald og endamál

Endamálið við uppgávuni er, at lærlingurin skal fáa innlit í, hvussu man handfer endurnýtt træ, áðrenn tað verður innlagt í eina nýggja konstruktión.

# Læraravegleiðing: 2.4.1 Handfaring av brúktum tilfari

## Uppskot til undirvísingarætlan

Framløga frá lærara num (5 min)

- Framløga av læringaevninum
- Bið næmingarnar lesa á heimasíðuni

Einstaklinga arbeiði (5 min)

- Lærlingurin lesur tekstin á heimasíðuni um handfaring av endurnýttum tilfari

Pør av 2 persónum (20 min)

- Lærlingurin kjakast um spurningarnar á heimasíðuni við ein floksfelaga.

## Afturmelding og meting

Kjakast um tykkara royndir í flokkinum.